# Sunnleif góð ummæli

**Sunnleif Rasmussen fær góð ummæli fyri verkini, ið framførd vórðu á Musikfestspelen Korsholm, sum var frá 27. juni til 5. juli**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Føroyska tónaskaldið, Sunnleif Rasmussen, var um mánaðarskiftið juni/juli við 11 verkum høvuðsnavn á Musikfestspelen Korsholm í Finlandi.



Festivalurin var frá 27. juni til 5. juli.

Fjølmiðlarnir lata væl at verkunum hjá Sunnleifi.

Huvudstadsbladet skrivar millum annað um Songs of Seasons:

»Og ligesom i mange af sine andre værker fra det seneste årti – blandt andet den af Nordisk Råd prisbelønnede Symfoni Oceanic Days – går Rasmussen tilage til den narrative færøske ballade-tradition, og det konkrete kvad får lov at styrke det associationsmæssige såvel som de rent musikalske processer, men i baner som beskriver sine forløb på betryggende afstand fra stof-fet.«

Sunnleif Rasmussen verður av Vasablaðnum spáddur til at fáa eina stóra karrieru í Finlandi, tí hansara tónleikastílur líkist nógv tí hjá finnum.

## Herverk á politigarðin

Um 19 tíðina fríggjakvøldið uppdagaðu løgreglumenn á politistøðini í Havn, at onkur hevði roynt at »fríðka« um garðin hjá teimum uttanfyri støðina. Viðkomandi hevði málað sokallað graffitti á sjálvan garðin, har hann hevði skriva »svín og sadistar« á.

Eisini aðrastaðni í grannalagnum varð málað á onkran vegg. Politiið veit ikki, hvør gerningsmaðurin er, men talan er helst um sama persón, tí hondskriftin er tann sama.

## Koyrdi avstað

Beint áðrenn midnátt fríggjadagin kom ein knallert koyrandi frá krossinum Eiragarður/Frælsi. Hann rendi beint í síðuna av einum bili, sum kemur koyrandi eftir vegnum. Drongurin, sum koyrdi knallertina, koyrdi avstað, men fólk, sum vóru hjástødd vistu, hvør hann var.

Politiið fann bæði drong og knallert heima hjá foreldrunum, og kann hann nú vænta sær eina heilsan frá fútanum.

Lítil skaði stóðst av óhappinum, og ongin fólkaskaði var.

## Datt av motorsúkklu

Ein maður datt leygardagin av eini 4-hjólaðari motorsúkklu á Glyvursnesi. Nakkin tók í, og maðurin kom til skaða, so sjúkrabilurin varð noyddur at fara eftir honum.

Men av tí, at ferðslulógin ikki er galdandi har, so hevði løgreglan onki við málið at gera.

## Rýmdu frá óhappi

Trý korter til átta sunnumorgunin kom ein maður framvið Eggvirkinum á Velbastað. Har kom hann fram á ein bil, sum var í knúsi frammanfyri autoverjuna. Hann sá tveir mans renna frá óhappinum og út í hagan. Tað vísti seg seinni, at bilurin varð stolin úr Havn.

Politiið í Havn sigur, at teir hava ikki funnið gerningsmenninar, men teir hava ein varhuga av, hvørjir teir eru.

## Farstøðin sum tilhaldsstað

Sambært politinum í Havn er Farstøðin vorðin til eitt tilhaldsstað fyri fullar menn, sum ganga runt og órógva tey ferðandi. Politiið er javnan har niðri fyri at reka teir burtur, og onkuntíð eisini fleiri ferðir um dagin.

## Ferðafólk hevði 15 gramm av hassji

Mánamorgunin tá Norrøna kom á Havnina fangaði hassjhundurin hjá løgregluni ein ferðandi, ið hevði hassj uppi á sær.

Viðkomandi varð tikin á støðina, og tað vísti seg, at hann hevði 15 gramm av hassji uppi á sær. Hann verður skuldsettur fyri brot á lógina um turvelvandi drøgg. Ferðafólkið fekk eina bót og varð síðani leyslatið aftur.

Framsýning í Margarinfabrikkini:

# Andaligi mentanararvur føroyinga

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Á ólavsøku skipar Missiónsfelagsskapur í Føroyum fyri framsýning í Margarinfabrikkini í Havn.

Roynt verður at lýsa hugtakið andalig virði, sum føroyingar eiga og hava havt upp ígjøgnum øldir. Nomið verður við ymisk øki, eitt nú familjuna, trúbótina, tilfeingi og annað.

Fyrireikararnir halda tað vera hugvekjandi og mennandi at hava arbeitt við hesum.

Endamálið við framsýningini er at lýsa og minna á hetta grundarlag, sum lagt er, og saman at fengast um tað hesar serligu dagarnar, sum ólavsøkan er.

Margarinfabrikkin, sum er karmur um framsýningina, er sera væl egnað til hetta, tí har er bæði rúmligt og ljóst inni.

Framsýningin er opin frá 15-22.

# Tingmenn dystast

Uppstillingarnar eru nú greiðar til politiska fótbóltsdystin millum samgonguna og andstøðuna á tingi. Dysturin millum samgongu og andstøðu verður á Ovara Vølli í Gundadali fríggjadagin kl. 16. Liðini spæla í T-troyggjum við búmerkinum til átakið: »Steðgið Harðskapi Móti Kvinnum« hjá Amnesty International. Við lutakasti er avgjørt, at samgongan leikar í svørtum og andstøðan í hvítum T-troyggjum. Andstøðan hevur ikki nóg mikið av fólki til eitt heilt fótbóltslið. Tískil eru nakrir leikarar leigaðir til endamálið. Uppstillingarnar eru hesar: Samgongan: Kaj Leo Johannesen, liðskipari, Bárður Nielsen, Bjørn Kalsø, Fritleiv Olsen, Høgni Mikkelsen, Helgi Abrahamsen, Jógvan á Lakjuni, Bjarni Djurholm, Jørgen Niclasen, Jákup Mikkelsen, Heðin Zachariasen, Kristian Magnussen, John Johannesen, Andrias Petersen, Henrik Old og Hans Pauli Strøm. Andstøðan: Høgni Hoydal, Páll á Reynatúgvu, liðskipari, Finnur Helmsdal, Heidi Petersen, Tórbjørn Jacobsen, Annita á Fríðriksmørk, Karstin Hansen, Kári P. Højgaard, Dánjal Petur (Piddi) Hansen, Bill Justinussen, Kristian Martin Petersen, Niklái Petersen, Heini Holm, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Sjúrður Skaale og Jákup Sverri Kass.

Dómari verður Nemus Napoleon Djurhuus. Frásøgufólk verða Eir í Ólavsstovu og Sigrún Brend.

Atgongumerki kosta 50 krónur. Undir dystinum verður møguleiki at ogna sær sama slag T-troyggjur, sum tinglimirnir spæla í, fyri 160 kr. Møguleiki verður eisini at keypa aðrar Amnesty vørur og okkurt at leska sær við. Allur ágóðin av tiltakinum fer til Amnesty arbeiðið.

**-HR**



# Nógvir møguleikar í gamla Kvøldloti

**Sambært eigaranum av gamla Kvøldloti, Høgna Danielsen, er enn óvist, hvat virksemi verður í bygninginum, sum stendur liðugur og klárur at taka í nýtslu í heyst. Millum onnur, sum hava víst áhuga fyri møguligum leigumáli, eru teir, sum í dag reka Eclipse, Platform og Café Natúr**

KVØLDLOT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn hevur eigarin av gamla Kvøldloti, Høgni Danielsen, eftir øllum at døma ikki gjørt av, hvat virksemi verður í bygninginum, sum er bygdur upp av nýggjum og væntandi stendur klárur at taka í nýtslu einaferð í heyst.

Sosialurin hevur frætt, at teir, sum reka Eclipse, Platform og Café Natúr, hava hugt at bygninginum og hava víst teimum møguleikum, ið har eru, áhuga.



*- Áhugi er fyri leigumáli, men enn er einki avgjørt, sigur Høgni Danielsen, sum fyri 8 árum síðan keypti gamla Kvøldlot frá Fossbankanum í konkurs. Bygningurin varð rivin niður er nú bygdur uppaftur, klárur at taka í nýtslu í heyst*

### Enn óvist

Petur Olsen, sum er ein av persónunum aftanfyri Eclipse, Platform og Café Natúr, váttar, at hann hevur tosað við eigaran, Høgna Danielsen, men talan hevur higartil bert verið um prát teirra millum.

– Eg datt fram við ein dagin, tá ið Høgni var har og fór inn á gólvið at forvitnast.

Petur leggur tó dent á, at eingin avtala er gjørd um nakað sum helst, men teir avtalaðu tó at venda aftur til málið.

– Tá ið vit starvast innan hesa »bransjuna«, hava vit eisini áhuga fyri teimum møguleikum, sum eru við gamla Kvøldloti.

Hann vísir á, at í prátinum teirra millum, dugdi Høgni ikki ítøkiliga at siga, nær bygningurin stendur klárur at taka í nýtslu.

– Men nú er eftir øllum at døma ikki nógv eftir at gera, sigur Petur Olsen, sum vísir á, at teir í fyrsta lagi hugsa um møguleikarnar við matstovuvirksemi.

### Fleiri møguleikar

Høgni Danielsen váttar, at hann og Petur Olsen hava prátað saman, men vísir á, at eingin leiguavtala er gjørd við nakran um bygningin, og tí er eisini ómøguligt enn at siga, hvat virksemi verður í gamla Kvøldloti.

Hann væntar, at bygningurin stendur klárur at taka í nýtslu einaferð í heyst.

Spurdur, hvørjir møguleikar eru, sigur eigarin, at ovara hæddin er 185 fermetrar og niðara 176 fermetrar.

– Soleiðis, sum ovara hæddin er innrættað, er hon væl egnað til eitt nú matstovuvirksemi, meðan niðara hæddin er meira klubbakend við møguleikum fyri dansi.

Høgni vísir á, at í bygninginum eru nógvir møguleikar – alt frá matstovu- og klubbavirksemi til skrivstovuvirksemi.

Hann sigur, at talan er um meira enn ein áhugaðan og møguligan leigara.

Spurdur, hvussu nógv bygningurin kostar, nú hann er um at verða liðugur, vil eigarin ikki siga nakað tal.

– Men bygningurin er dýrur, leggur hann aftrat.

Høgni Danielsen keypti gamla Kvøldlot fyri 8 árum síðan frá Fossbankanum í konkurs.

# Gamla Sæborg umbyggjast til línubát

**Seinni í heyst fer gamla Sæborg aftur til fiskiskap, men hesaferð verður tað ikki við troli. Í løtuni verður skipið umbygt til línubát og fær rættindini hjá Vesturleitinum og Norðfinni**

UMLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gamla Sæborg, sum Háldan Haldansen eigur, fer neyvan nakrantíð aftur at trola. Í løtuni liggur skipið í Hvalvík, har tað verður umbygt til línubát. Skipið fær rættindini hjá Vesturleitinum og Norðfinni, sum eru løgd saman í eitt loyvi.



*Seinni í heyst fer gamla Sæborg, sum nú verður umbygd, á línuveiði*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Háldan sigur, at trolspølini verða tikin úr skipinum, og síðan verður línuspæl og egningarmaskina sett í skipið, sum eisini fær dragilúku.

– Vit keyptu gomlu Sæborg í vár, men áðrenn keypssáttmáli varð undirskrivaður, tryggjaðu vit okkum, at neyðugu loyvini vóru í lagi.

Reiðarin væntar, at skipið, sum fær annað navn, ið hann kortini ikki vil avdúka enn, verður klárt at fara til fiskiskap aftur um mánaðarskiftið, september/oktober.

Manningartalið umborð á gomlu Sæborg verður á leið tað sama sum við Vesturleitinum, 6-7 mans, og skipari verður Jan Haldansen.

Háldan Haldansen sigur, at tann parturin av skipinum, sum verður umbygdur, eisini verður sandblástur og málaður av nýggjum.

Lastin verður fyribils óbroytt.

